## inni - trygt og ómaksleyst til hús



### Nýggj sethús – undir Kerjum 3, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum á 115 fermetrar - í alt 230 fermetrar. Hartil er stórt óinnrættað loft á 90 fermetrar. Grundøkið er 550 fermetrar. Byggiár: 2004. Húsini, ið eru sera orkusparin og bílig í drift, eru Norðseturhús snið 115. Í erva er inngongd, durur / gongd, gestawc, arbeiðsrúm / kamar, matarkøkur, stova / borðstova, arbeiðsrúm / kamar, millumgongd, hjúnarrúm, baðirúm, kamar og niðurgongd til kjallara. Ì niðastu hædd er vaskirúm / fýrrúm / kjallararúm, ið lættliga kann innrættast. Húsini eru sera snøgg og uttanum er garður / urtagarður. Húsini, sum standa í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi nær býnum, hava sera gott útsýni oman yvir Havnina.



### Sethús - Oyrarbakkavegur 14, 400 Oyrarbakki

Húsini eru í 3 hæddum - samlað búvídd uml 125 fremtrar. Grundøki uml 812 fermetrar. Í ovastu hæddini er gongd, wc og 4 kømur. Í miðhæddini er gongd, kamar, køkur, kovi og stova Í niðastuhæddini er baðirúm, kjallararúm/- fýrrým og goymslurúm. Húsini standa í friðarligum, fríðum umhvørvi og hava frítt útsýni yvir fjørðin. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



### Tvíhús - Hjallavegur, 600 Saltangará

Ætlanin er at byggja eini tvíhús á Hjallavegi Saltangará matrikkul nr. 146 K. Húsini eru 50,3 fermetrar í stovuhædd og 34,5 fermetrar í loftshædd umframt ein hjallur. Húsini eru úr timbri, bygd til tað Føroyska veðurlagi. Vindeyguni eru úr plast við pálagdum sprossum. Innan eru viðgjørd loft, trappir og innhurðar,skrá veggir á lofti eru klæddir við grannprofil. Køkur er av slagnum Designa køkken, baðirúm hava møbil, vinylsveis á gólv og brúsu. Í vaskirúmi eru flísar.Gólv í miðhædd er parkett ,og á lofti laminat. Glasvev verður á veggunum. Stovuhæddin: stova 20,5 m2, køkur 12,5 m2, vaskirúm 6,3 m2, durur 4 m2, baðium 3 m2, trappuuppgongd 4 m2 og hjallur. Loftshædd: baðirúm 7 m2, kamar 9 m2, kamar 8 m2 og kamar 7,5 m2 og gongd 3 m2.
Húsini verða latin lyklaklár ,spf strok stendur fyri málingini,og spf Svalin fyri byggingini. Gólv,køkur og baðirúmsmøbil kann sýggjast hjá Højgaards Handilsvirkið.



### Grundstykki – Velbastaður

Grundøkið, ið er bert 7 min. við bili frá miðbýnum í Havn, er í tí nýggja, stásiliga og barnavinarliga býlingininum á Velbastað við sera góðum útsýni yvir Sandoynna, Koltur og Hestur. Økið liggur beint við skúla og nýggjan barngarð, og nýggjur asfalteraður vegur verður inn til grundøkið. Støddin á grundøkinum er um 512 fermetrar. Grundøkið verður selt, um hóskandi boð fæst.



### Nýggj sethús – Heygagerði 3, Sandavágur

Húsini eru í 1 hædd - í alt 143 fermetrar. Harav er garaga á 23 fermetrar. Grundøkið er 564 fermetrar. Byggiár: 2006. Har er inngongd, durur / gongd / gestawc, bryggers við innbúgvi og útgongd til sera snøgga garagu og hjall við egnari útgongd, køkur / alrúm / stova, hjúnarrúm, baðirúm og 2 kømur. Møguleiki er fyri at innrætta loftið. Gólvhiti og seriuforbundin roykvarnaraskipan er í øllum húsinum. Húsini eru sera væl gjørd við góðum handverki og góðum tilfari. Tey eru væl bjálvað og sera bílig í drift. Húsini standa í sera náttúruvøkrum og barnavinaligum umhvørvi við sera góðum sólargangi og panoramaútsýni yvir bygdina og vágna. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



### Sethús – Sivarsvegur 2, Hoyvík

Húsini eru í 2 hæddum, niðara hædd á um 85 fermetrar, ovara hædd á 65 - í alt um 150 fermetrar. Hartil er garaga á uml. 30 fermetrar. Grundøkið er 522 fermetrar. Byggiár: 1984. Tilbygningur, garaga og hitaverk er frá 1988. Húsini eru væl bjálvað og orkusparin, og Genvex luftskiftisskipan er í húsinum. Í niðaru hædd er inngongd, goymslurúm, hjallur, fýrrúm, durur / gongd, gestawc, klædnarúm / goymslurúm, køkur / alrúm / borðsstova við útgongd til terassu, stór stova og bryggers / vaskirúm við egnari inngongd. Í ovaru hædd er trappugongd, stova / alrúm, stórt hjúnarrúm, baðirúm og 2 kømur. Húsini standa væl fyri í friðarligum og barnavinaligum umhvørvi og hava nakað av útsýni. Prisuppskot: kr. 2.500.000,00.



### Snøgg sethús – Toftavegur 5, Vágur

Húsini eru í 3 hæddum, hvør á 64 fermetrar - í alt 192 fermetrar við 2 sjálvstøðugum íbúðum. Grundøkið er 272 fermetrar. Upprunaliga eru húsini frá 1909, men bert grundirnar og nakrar sperrur eru gamlar - alt annað er nýtt frá 2005. Húsini eru úr timbri á stoypta og lagaða grund við alutaki, plastvindeygum og plastklædningi. Húsini eru tí so gott sum viðlíkahaldsfríð. Hartil er gólvhiti allastaðni og luftútskifting við endurvinningsskipan (Genvex), ið ger, at húsini eru orkusparin og sera bílig í drift. Tele- og sjónvarpsdósir eru í øllum rúmum. Í miðhæddini er inngongd, durur, hjúnarrúm, gongd, baðirúm, stórt kamar, køkur / alrúm / stova. Í ovastu hædd er trappugongd, durur, stórt hjúnarrúm, gongd, baðirúm, stórt kamar, køkur / alrúm / stova. Húsini standa sera væl fyri í vøkrum og veðurgóðum umhvørvi nær við skúla og barnagarð og hava sera gott útsýni. Prísuppskot: kr. 1.000.000,00.



### Sethús – Handan Á, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum á 125 fermetrar - í alt 250 fermetrar. Grundøkið er 411 fermetrar. Byggiár: 1969. Húsini eru so við og við dagførd, so tey nú eru í góðum standi. Í erva er inngongd, durur, trappugongd, bryggers við egnari inngongd, gongd, baðirúm, matarkøkur, borðstova / stova, stórt kamar við egnum baðirúmi. Í neðra er inngongd, durur, gongd, 2 kømur, baðirúm, vaskirúm, goymslurúm, fýrrúm og kjallararúm. Húsini eru væl egnað til rørðslutarnað. Tey standa í veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi nær miðbýnum. Stutt er til skúla, barnagarð, útbúgvingarumhvørvi, hospital og busssamband. Prísuppskot: kr. 2.300.000,00.



### Hugnalig sethús – Húsabrekka 3, Sandavágur

Húsini eru í 2 hæddum. Ovara hædd er 44 fermetrar og niðara hædd er 36 fermetrar - í alt 80 fermetrar. Grundøkið er 573 fermetrar. Byggiár: 1955. Húsini eru síðan dagførd so við og við og eru í góðum standi. Í erva er inngongd, gongd, baðirúm, hjúnarrúm, kamar, køkur / alrúm / stova. Í neðra er vaskirúm / fýrrúm / kjallararúm og goymslurúm. Húsini standa í veðurgóðum, náttúruvøkrum og barna- og eldravinaligum umhvørvi og hava gott útsýni. Húsini eru løtt at halda og hóska eisini væl til summarhús.



### Sethús – Trongisvágur

Húsini eru í 3 hæddum, kjallari og miðhædd uml. 48 fermetrar og loft 24 fermetrar, Grundøkið er 395 fermetrar. Húsini eru í ringu standi og treingja til munandi ábøtur. Prísuppskot kr. 150.000,00

MYND VANTAR

### Grundstykkið – Mylnugøta 9, Signabøur

Ognin er eitt grundøki, matr.nr. 293e, ið liggur á Mylnugøtu 9, Signabø. Økið liggur ovaliga í bygdini og er 600 fermetrar til víddar.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni

Sosialurin 341800